# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Palma Dal-Christiansen 80 ár



Mánadagin 4. juni verður Palma Dal-Christiansen í Havn 80 ár.

Palma, ið er fødd Rasmussen, er ættað av Skála.

Hon var yngst av 13 systkjum, har bert hon og beiggin Kristian Rasmussen á Skála eru eftir á lívi.

Sum 15 ára gomul kom Palma til Havnar at tæna og at ganga á handilsskúla um kvøldið.

Hóast hon hevur búð í 65 ár í Havn, so er hon enn líka góð við heimbygdina.

Eingin sum prátar við Palmu ivast í at hon er av bygd, tí at dialektin er hin sama sum áðrenn hon flutti av Skála

Palma giftist Bjarna Dal-Christiansen nýggjársaftan 1950, og hava tey sostatt verið gift í 56 ár, tey eiga børnini Annelin og Kára, seks ommubørn og eitt langommubarn.

Palma er sera góð við ommubørnini og elskar at hugna um tey. Børnini trívast sera væl heima hjá ommu og abba - tað er fáur dagur har ongin teirra vitjar.

Palma hevur altíð verið handilskona, og hetta starv dámdi henni ógvuliga væl. Henni dámdi væl at hava við fólk at gera og dugdi væl at vegleiða kundunum ið t.d. skuldu keypa gardinur til nýggj hús. Kundarnir komu altíð aftur at keypa, so hon var nokk eisini væl dámd av teimum.

Sum heilt ung var hon í handlinum hjá Hans Joensen, seinni í Smæruni, hjá Katrinu Christiansen og í mong ár sum leiðari í Litbrá.

Í nøkur ár hevði hon sjálv klæðahandilin "Hjá Palmu" í J. Paturssonargøtu í Havn, og hon ferðaðist sum umboð fyri danskt klædnamerki í 20 ár.

Í eitt tvey ára skeið, fyrst í sjeytiárunum, búði familjan í Keypmannahavn, tá arbeiddi Palma í einum skógvahandli í Hvidovre.

Palma er sera lívsglað og altíð í góðum lag, hon er ágrýtin sum fáur, so hóast árini nú eru 80, merkist ikki nógv til aldurin. Hon heldur sjálv, at tað gongur nakað seint, men er kanska nakað ótolin, ella dámar henni best at ferð er á.

Føðingardagurin verður hildin við einum nátturðabita leygarkvøldið 2. juni heima í J. Paturssonargøtu 30, har øll eru hjartaliga vælkomin.

# Tíðarmynd frá 30-unum




Her ein mynd av trimum kvinnum, sum vit hava gjørt eina roynd at stað- og tíðarfesta.

Í bókini "Tíðarhvarv – Elisheimið í Havn", sum Jákup Lindenskov hevur skrivað, hava vit funnið fram ymiskar upplýsingar.

Myndin er tikin í garðinum hjá Jóannesi á Fossinum, yvirav Ellisheiminum í Havn.

Meta Danielsen (v.m.) og Elsa Isaksen, nevnd Huld-Elsa (h.m.), búðu báðar á Ellisheiminum. Í miðjuni situr Ida Didriksen (1911-2002) úr Vestmanna, sum var fyrsta arbeiðskona har, tá ellisheimið læt upp í august 1935. Ida giftist Sonna Mørkøre úr Havn og var mamma eitt nú Jákup Mørkøre, kemiverkfrøðing, og Hera Mørkøre landsapotekara.

Meta Danielsen andaðist 31. oktober 1937, 77 ára gomul, og Elsa Isaksen andaðist 29. august 1940, 86 ára gomul. Tær vóru báðar, hvør á sín hátt, kend andlit í Havn. Ida Mørkøre andaðist í 2002, 91 ára gomul.

Ida arbeiddi á Ellisheiminum í tvey ár, so eftir tí at døma er myndin tikin millum 1935 og 1937.

Um onkur veit meira um hesa myndina, er viðkomandi vælkomin at kontakta Annfinn Danielsen, sum eigur myndina, á telefon: 224124.

**Dagurin**

**2. juni. Marcellinus**, prestur í Róm, sum varð hálshøgdur umleið ár 300

**3. juni. Erasmus**, deyður umleið ár 300. Biskupur í Antiokia. Fleiri ferðir varð lagt eftir honum, og hann varð illa píndur, men komst undan og doyði í friði og náðum. Navnið kemur av grikskum orði, ið merkir elskar.

**4. juni. Obtatus**, deyður umleið ár 390. Var upprunaliga heiðin maður, sum gjørdist kristin og endaði sum biskupur í Milevis í Numidiu. Hann doyði strádeyðan.

†

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Theodor Samuelsen**, fer úr kapellinum á Klaksvíkar sjúkrahúsið heim í Christianskirkjuna fríggjadagin klokkan 19. Jarðarferðin verður úr Christianskirkjuni leygardagin klokkan 12.

†

Kunngjørt verður, at okkara elskaða kona, mamma, vermamma, omma og langomma

**Lydia Margretha Larsen**
Porkeri

andaðust á Suðuroyar Sjúkrahúsi onskvøldið 30. mai, 84 ára gomul.
Jarðarferðin verður úr Betania í Porkeri sunnudagin 3. juni kl.13.00.

*Familjunnar vegna*
**Pidda, Per, Ansa, Kaj, John og Heri**

Tey, ið vilja minnast Lydiu, kunnu lata eina gávu til Betania í Porkeri.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið vístu samkenslu, tá kæri maður mín, pápi, verfaðir og abbi okkara

**Sverri Jacobsen**
Húsavík

andaðist og varð jarðaður.
Tøkk fyri blómur, kransar og heilsanir.
Takk til Jákup Reinert, prest, kirkjutænarar, sangarar, berarar og tykkum, ið hjálptu til við jarðarferðini og ervinum.
Takk til starvsfólkið á B7 og G1 fyri røkt og umsorgan hansara seinastu viku.
Takk til Hera Joensen fyri vælvald orð í kapellinum.
Takk til tykkum, ið vóru um hann í tí dagliga.
Takk til tykkum, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.
Hjartans tøkk øll somul

**Elsubeth Helena, Heri og Fríðbjørg v/fam.**

Sosialurin
www.sosialurin.fo